# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Leivur Olsen farin



Leygardagin 25. november andaðist Leivur Olsen, Hoyvík, 65 ára gamal.

Leivur var kvívíkingur, men búði í høvuðsstaðnum í næstan hálva øld. Hann hevði gott fólkatekki, altíð blíður og vinsælur.

Sum ferðandi sølumaður í eini 35 ár kom Leivur í samband við nógv fólk og var kendur í nærum hvørjum króki í landinum, og munnu tey flestu minnast hann fyri vinsæla og lætta lyndið.

Foreldrini hjá Leivi vóru Johannes Pauli Olsen og Dagmar, f. Jacobsen. Tey høvdu telefonstøðina í Kvívík, so Leivur var uppvaksin við, at nógv fólk kom á gátt.

Í 1958 leitaði Leivur sær til Havnar á háskúla. Árið eftir fór hann í læru hjá Thomas Dam.

Eftir lokna lærutíð arbeiddi hann ymsastaðni, til hann fyrst í sjeytiárunum byrjaði sum sjálvstøðugur sølumaður.

Leivur giftist Marnu, f. Dam, úr Sandavági, í 1965. Tey taldust millum teirra, sum bygdu í Hoyvík fyrst í sjeytiárunum, tá Hoyvíkin enn lá nakað uttan fyri Havnina.

Tey fingu synirnar Dagfinn (f.1967) og Theodor Eli (f. 1976).

Leivur gekk høgt upp í familjuna og synirnar. Seinastu árini fegnaðist hann eisini um abbadøturnar Torgerð og Elisu. Familjan kom altíð í fremstu røð, og hann var altíð til reiðar, um tað var okkurt, ið hann kundi vera til hjálpar við.

†

## Andlát og jarðarferðir

**Lorensa í Selvindi**, Strendur, andaðist á Århus kommunehospital sunnudagin 26. november, 58 ára gomul. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

**Súsanna Kragesteen**, fødd Debes, ættað av Oyri, vanliga nevnd Sanna, andaðist á Landssjúkrahúsinum sunnudagin 26. nov., 85 ára gomul. Kistan fer av Landssjúkrahúskapellinum týskvøldið kl. 18.00. Jarðarferðin verður mikudagin kl. 13.00. úr Havnar kirkju.

**Fanny Reinert Djurhuus**, Innan Glyvur andaðist hósdagin 23. november, 76 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Sjóvar kirkju mikudagin kl. 13.00. Tey, ið vilja minnast Fanny, kunnu lata Sjóvar kirkju eina peningagávu; konta í peningastovninum.

**Hanna Sofía Jørgensen**, ættað úr Miðvági, búsitandi í Dragør andaðist mánamorgunin 27. november, 49 ára gomul.

**Ib Tórsheim** ættaður úr Havn, andaðist í Herlev, fríggjadagin 24. november, 80 ára gamal.

**Leivur Olsen** ættaður úr Kvívík, búsitandi í Hoyvík, andaðist leygardagin 25. november, 65 ára gamal. Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum mikukvøldið kl 18. Jarðarferðin verður úr Havnar Kirkju hósdagin kl 13.

Aksturvinnufelagið Samfylking:

# Ókeypis busskoyring - steinur omaná byrðu

**Um busskoyringin verður ókeypis, verður tað steinur oman á byrðu hjá okkum, sigur Magnus Fuglø, formaður í aksturvinnufelagnum Samfylking, sum framvegis bíðar eftir nýggjari hýruvognsreglugerð**

FLUTNINGSVINNA
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*




*Magnus Fuglø, formaður í aksturvinnufelagnum Samfylking*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Í sambandi við at býráðið hevur samtykt at borgararnir í Tórshavnar kommunu skjótt kunnu koyra ókeypis við býbussunum, sigur Magnus Fuglø, formaður í aksturvinnufelagnum Samfylking, at hetta verður steinur oman á byrðu hjá teimum sum koyra hýruvogn, soleiðis sum koyringin er í dag.

Vit hava havt samband við kappingarráðið, og teir bóðu okkum senda eitt skriv inn um málið, so teir kunnu viðgera tað á fundi.

Annars er tað hálvtannað ár síðan hýruvognsnevndin hjá býráðnum (ein trímannabólkur) varð settur at snikka eina nýggja hýruvognsreglugerð til, men har er einki hent.

Vit hava flerir ferðir rykt eftir reglugerðini, men teir lova, at nú verður tað heilt skjótt at hon verður løgd fram, men har er einki hent. Reglugerðin hevur 20 ár á baki og er ikki tíðarhóskandi í dag.

Formaðurin í hýruvognsnevndini hjá býráðnum hevur verið tann ídnasta at fáa bussarnar at koyra ókeypis. Eisini hevur uppskot verið frammi um, at náttarbussar skulu koyra alla náttina í vikuskiftinum. So framtíðarútlitini eru ikki góð í løtuni, sigur Magnus Fuglø.

### Básar mangla

Í sambandi við hýruvognsbásarnar uttan fyri SMS, vóru vit á fundi við stjóran í SMS, Niels Mortensen, í summar, meðan stóra umbyggingin fór fram. Hann segði, at teir høvdu eisini hugsað um hýruvogarnar í sambandi við parkeringabásarnar. Tekniska deild hjá býráðnum fór at skelta parkeringsbásaranar og eisini hýruvognsbásarnar. Higartil hava teir bert skeltað parkeringsbásarnar til bilarnar hjá kundunum, men ikki til hýruvognarnar, sigur Magnus Fuglø.

Samfylking harmast um at hýruvognsvinnan ongan góðan eigur, og at myndugleikarnir ikki hjálpa teimum at fáa skipaði viðurskifti, soleiðis at tað ber til at liva av at koyra hýruvogn í Tórshavnar kommunu, sigur Magnus Fuglø, formaður í felagnum.

Hýruvognsvinnan hevur tað ikki lætt í Tórshavnar kommunu. Talan er um eina vinna burturav, sum góðar 60 familjur í kommununi skulu liva av. Ringt er hjá einum hýruvognseigara at fáa endarnar at røkka saman, hóast hann hevur langar arbeiðsdagar allar yrkadagarnar í vikunu. Teir eru eisini noyddir at hava bilarnar koyrandi um næturnar í vikuskiftinum, fyri at tað í heila tikið kann hanga saman, sigur Magnus Fuglø, formaður í aksturvinnufelagnum Samfylking.